**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktarfrøðingar til G3, medisinska ambulatorium

Á **G3** med.amb. eru tvey føst hálvtíðarstørv leys at søkja:

- við tænastu á G3 onko. amb. til setan 1. september 2004 ella eftir avtalu
- við tænastu á G3 diabetes amb. frá 1. oktober 2004 ella eftir avtalu

Áhugaverdar avbjoðingar liggja fyri framman, nú G3 med. amb. fer at flyta í nýggjan bygning.

**Arbeiðsuppgávur á onko amb. er í høvuðsheitum**
- kunna og vegleiða sjúklingar og avvarðandi um krabbamein
- tryggja eina kvalifiseraða viðgerð og eftirkanning av sjúklingum
- samskipa samstarv við aðrar deildir, primer øki og Ríkissjúkrahúsið
- kunna, vegleiða og undirvísa aðrar deildir um røkt og viðgerð av krabbameinssjúklingum
- samskipa viðgerð og eftirkanning hjá krabbameinssjúklingum
- sjálvstøðugar viðtalur
- ráðgeva um linnandi sjúkrarøkt
- geva kemoviðgerðir

**Arbeiðsuppgávur á diabetes amb. er í høvuðsheitum**
- kunna, vegleiða og undirvísa sjúklingum og avvarðandi um diabetes
- undirvísa individuelt og í bólkum
- gera undirvísingarætlanir til sjúklingar
- seta fyribyrgjandi tiltøk í verk
- kunna, vegleiða og undirvísa aðrar deildir um røkt og viðgerð av diabetessjúklingum
- samskipa samstarv við aðrar deildir og primer øki
- samskipa viðgerðir og eftirkanningar hjá diabetes sjúklingum
- sjálvstøðugar viðtalur
- gera viðgerðir

**Førleikakrøv**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- faklig vitan innan økið
- kliniskar royndir innan røkt og viðgerð á økinum
- hug til tvørfakligt samstarv
- góð samstarvsevni
- arbeiða sjálvstøðugt

**Fyrimun hava umsøkjarar sum hava**
- onkologiska eftirútbúgving, til onko. amb.
- diabetes eftirútbúgving, til diabetes amb.

**Lønar- og setanartreytir**
Størvini verða sett sambært sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið. Setanarøkið er Landssjúkrahúsið, og arbeiðs- og tænastustað er med. depilin G3, med. amb. við tilvísing tilleiðandi sjújkrarøktarfrøðingin á med. deplinum.

**Nærri fæst at vita** um størvini við at ringja til onko. amb. tlf. 304500, lokal 6211, ella diabetes amb. lokal 6222, ella til Ásju Poulsen leiðandi sjúkrarøktarfrøðing lokal 6102, e-postur asap@ahs.fo

**Umsóknarfreistin** er 19. juli 2004 kl. 12.00.

**Skrivlig umsókn,** merkt »umsókn um starv« við CV, autorisatión, avirt av prógvum og viðmælum o.l., skal sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
FO-100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«.*

Barnagarðurin á Velbastað søkir eftir

## Pedagogi til vøggustovuna

at byrja 15. august ella eftir avtalu.

Arbeiðstíðin er 35 - 40 tímar um vikuna
- Hjálparfólk eru vælkomin at søkja starvið.

Vit ynskja
- at tú sær møguleikar og avbjóðingar í náttúruni.
- at tú hevur áræði at skapa ein tryggan dag við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum.
- at tú verður við til at mynda og menna okkara pedagogiska umhvørvi.
- at tú luttekur í arbeiðinum við at skapa tann nýggja stovnin, ið verður liðugur á heysti 2005

Vit eru ein dagstovnur við 22 barnagarðsbørnum og 11 vøggustovubørnum og bjoða.
- eitt livandi arbeiðspláss,
- 7 eldhugaðir starvsfelagar
- og eitt spennandi uttandura umhvørvi.

Umsóknir við prógvum o.ø. skulu stílast til Barnagarðin á Velbasta og verða okkum í hendi seinasta í lagið hósdagin 15 juli.

Meiri fæst við at venda sær til Honnu Jacobsen, leiðara ella Borgny Jacobsen, varaleiðara á tel. 328121.

KIRKJUBØAR KOMMUNA

**Vegna broytingar í vøruúrvælinum verður goymslan umskipað tessvegna selja vit við STÓRUM AVSLÁTTRI partar av goymsluni**

Talan er um : Máling, tapet, gólvrestir, tundurgólv, smáteppir, máttur, flísar og kina møblar

**RING 316066**
**máling & gólv**
**Fyribils eru vit at hitta á Bóndaheygi 4**

Nakað av goymsluni ætla vit at halda áfram við, og er tí ikki partur av goymslutømingini
- tó fáa tey ið keypa hesar vørur eyka avsláttur um tey keypa av restgoymsluni

**TIL DØMIS:**
**TAPET FYRI 0,- kr**

Sosialurin 341800

# Hús í Vágbotni



Magnus Heinasonar gøta 2 til sølu fyri 1,3 mió. ella hægsta boð yvir.

**Tlf. 22 80 90**

# Til Sølu



Ein grønur Peugeot 307 HDi · árg. 2002
km. 38.100 **Prísur kr. 140.000,-**

**Tel 27 29 88**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

**Upprudding á Óðinshædd**

Vegna upprudding á parkeringsøkinum á Óðinshædd, matr. nr. 1474, Tórshavn, verða øll tey, sum eiga nakað á hesum øki, biðin um at taka hetta burtur áðrenn

**mánadagin 12. juli 2004**

annars verða neyðug stig tikin fyri at beina tað burtur fyri eigarans rokning.

SNARSKIVAN

**Lesið Sosialin**

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo



# Tíðaravmarkað starv sum talilærari í Tórshavn

Søkt verður eftir talilærara at arbeiða fulla tíð við børnum undir skúlaaldur í Tórshavnar Kommunu. Í arbeiðinum verður dentur í mest møguligan mun lagdur á at ráðgeva pedagogum og foreldrum í teirra dagliga arbeiði við børnum við seinkaðari málmenning.

**Tíðarskeið:**
Skúlaárið 04/05.

**Førleikakrav:**
Lærari ella pedagogur við talilæraraútbúgving. Umsøkjarar við audiologopediskari útbúgving eru eisini skikkaðir til starvið.

**Løn:**
Eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag ella við Føroya Pedagogfelag.

Meira fæst við at vita um starvið við at venda sær til EgonHansen, tali- og hoyriráðgeva, tlf. 315383/215383 ella Hans Eli Dahl, stjóra, tlf. 314919/225803.

Umsóknir við avriti av próvskjølum og tilmælum skulu vera Sernámsdeplinum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 16. juli 2004.

**Sernámsdepilin**
Frælsið 32 · Postrúm 2036 · FO-165 Argir
Tlf. 314522 · Fax 310196

# Bygningur í miðbýnum til leigu



Tygum kunnu seta tygum í samband við undirritaða á tlf. 317920 ella 313536.

**Høgni Lützen**
**P/F Valdemar Lützen**

# Útróðrarbátur

ynskist til leigu/láns – helst fult útgjørdur.

**Tlf. 36 17 88**
**Best millum kl. 18-21**

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Læknaskrivari

Á **Medisinska deplinum** er fast fulltíðarstarv sum læknaskrivari er leyst at søkja til setan 1. august 2004 ella eftir avtalu.

**Førleikakrøv**
- útbúgving sum læknaskrivari
- tænastusinni
- dugir at raðfesta arbeiðið, sum til tíðir er krevjandi
- góð samstarvsevni
- góður røkjuskapur
- teldukunnleiki

**Setanartreytir**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Sæunn Ólavsdóttir Hansen, leiðsluskrivara, telefon 304500, lokal 6103 ella á e-postur saunn@lsh.fo

Umsóknarfreistin er 19. juli 2004 kl. 12.00.

Skrivlig umsókn, merkt »umsókn til starv« við C.V., avriti av prógvum og viðmælum o.l. skal sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
FO-100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«.*

# Haldórsvíkar Skúli

Vegna avlopstímar verður søkt eftir lærara 5 t/v.

Tann, ið settur verður, má kunna undirvísa í handarbeiði og heimkunnleika.

Starvið er tíðaravmarkað til skúlaárið 2004/2005 og verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Møguligar umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi mánadagin 12. juli 2004.

**Haldórsvíkar Skúlastýri**
v/ Martin Hansen
438 Langasandur

# Mini gravmaskina

Alt arbeiði við mini gravmaskinu verður gjørt, so sum urtagarðar, smáir vegstubbar, grava fyri kaðalum, grava út fyri bilhúsum o.a.

Arbeiði við brekkara verður eisini gjørt.

**Fa. Hans P. Hansen**
477 Funningsfjørður
Fá meira at vita á tlf. 212631 ella 441631

*Vit taka minstu uppgávur í størsta álvara.*

# Skrivstovufólk

**til**
**Hjálpartólamiðstøðina (HTM)**

Á HTM eitt fulltíðarstarv sum skrivstovufólk leyst at seta sum skjótast.

HTM er deild av Almannastovuni og umsitur hjálpartól, umbyggingar í heiminum og avlamisbilar til fólk, ið bera brek. Í løtuni starvast 14 fólk á HTM harav 2 á skrivstovuni/móttøkuni.

**Arbeiðsuppgávurnar fevna m.a. um**
- bókhald
- journalisering
- móttøku og telefonavgreiðslu
- vanligt skrivstovuarbeiði

**Vit søknast eftir einum starvsfelaga sum hevur:**
- útbúgving innan skrivstovuyrki
- drúgvar royndir innan yrki
- góð samstarvsevnir
- góðan telduførleika
- góðan førleika at orða seg skrivliga á føroyskum
- kunnleika til journalisering (DocuLive) er ein fyrimunur
- kunnleika til C5

**Vit kunnu bjóða:**
- sjálvstøðugt arbeiði
- nýggja tøkni
- flextíð

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Tann sum settur verður, skal kunna tola broytingar í starvinum

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Palla Mortensen, leiðara á HTM tel. 358300.

Umsókn við avriti av viðkomandi skjølum skal sendast til Hjálpartólamiðstøðina, Postboks 1049, 110 Tórshavn

**Umsóknarfreist:** 16. juli 2004

# Nólsoyar skúli

Søkt verður eftir lærara til skúlaárið 2004/05. Undirvísingarøkið verður antin byrjunarundir vísing ella í framhaldsdeildini og nakrir tímar vegna serligan tørv.

Tímatalið verður væntandi 26 t/v vegna avlops tímar.

Starvið, sum er tíðaravmarkað skúlaárið 2004/05, er lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið frá skúlaleiðaranum, tlf. 327119/527119.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi mánadagin 12. juli.

**Nólsoyar skúlastýri**
v/ Annu Marnu Holm
FO-270 Nólsoy